svf

Starvið sum

# Fyritaksstjóri í Sjónvarpi Føroya

er leyst at søkja

Fyritaksstjórin er settur beint undir og við tilvísing beinleiðis til sjónvarpsstjóran. Bygnaðurin á stovninum er "flatur" við eini stjórn við stápseindum, eini fíggjar- og fyrisitingardeild, eini kt-deild umframt programmdeildunum.

Bygnaðurin í Sjónvarpi Føroya er seinastu tvey árini munandi umskipaður, og fíggjarstýringin og mannagongdir annars eru og verða tillagaðar nýggja bygnaðinum. Hetta ber m.a. í sær, at tær ymsu deildirnar hava fingið størri sjálvstøðu og samstundis munandi størri fíggjarligar ábyrgdir.

**Starvið:**

Fyritaksstjórin hevur við ábyrgd mótvegis sjónvarpsstjóranum dagliga raksturin av stovninum um hendi, bæði hvat fyrisiting og fíggjarstýring viðvíkur. Starvið fevnir soleiðis um

- gerandis budgetteftirlit
- starvsfólkaviðurskifti
- fyrisitingarligar mannagongdir
- dagligt keyp

Høvuðsuppgávurnar hjá fyritaksstjóranum eru at leiða og skipa fyri tí dagliga arbeiðinum á fíggjar- og fyristingardeildini og at leggja til rættis ársfíggjarætlanir og langtíðar fíggjarætlanirnar innan teir karmar, sum stovnurin hevur at virka undir. Ein týðandi leiklutur hjá fyritaksstjóranum er at virka sum samstarvspartur bæði hjá stjóranum og hinum deildarstjórunum í øllum fíggjarligum og fyrisitingarligum málum. Á inntøkusíðuni skal fyritaksstjórin virka sum samstarvspartur hjá marknaðardeildini.

Miðað verður eftir, at fyritaksstjórin er virkandi stjóri, tá sjónvarpsstjórin er burturstaddur ella hevur forfall.

Arbeiðsuppgávurnar fevna um:

- dagligu roknskaparførsluna og at gera deildarroknskapir
- at seta upp roknskapir fyri tíðarskeið og ársroknskapir
- at hava um hendi rakstrar- og gjaldførisætlanir
- at fyrisita yvirordnað starvsfólkaviðurskifti
- at skipa fyri mannagongdum á øllum fyrisitingarligum økjum
- at greina starvsfólkapolitikk og virkisgongdir
- leiðsluna av móttøkuni og skrivstovuni
- ábyrgd av ognunum, sum stovnurin húsast í

**Umsøkjarin:**

Starvið er avbjóðandi, og hevur tú hug at royna teg, krevst, at tú hevur lokið búskaparligt embætisprógv ella hevur aðra samsvarandi útbúgving. Tað hevur eisini áhuga, hvørjar viðkomandi royndir, tú annars hevur.

Tað er avgerandi, at tú sum umsøkjari eisini hevur ein liðiligan hugburð og góð samstarvsevni. Starvið krevur evnini til at arbeiða sjálvstøðugt og at taka avgerðir — ofta í eini knappari vending - og at boða stavsfelagum og starvsfólki frá teimum á ein tílíkan hátt, at tað elvir til loysnir og framburð.

**Setanarviðurskifti:**

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

- - - - -

Hevur tú áhuga fyri at fáa meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Trónd Djurhuus, sjónvarpsstjóra, á tlf. 340400 ella til Jógvan Amonsson, ríkisgóðkendan grannskoðara, Inpact á tlf. 314700.

Ætlanin er at seta starvið skjótast tilber. Umsóknir við prógvum og møguligum øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast í brævbjálva, merktur „Umsókn/SvF", til

Grannskoðaravirkið Inpact p/f,
att.: Jógvan Amonsson,
R.C.Effersøesgøta 26,
100 Tórshavn

soleiðis, at tær eru virkinum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 25. august 2000 kl. 16**.

Tórshavn, 27. juli 2000

**Sjónvarp Føroya**





## Kommunuskrivstovan í Gøtu

verður stongd vegna summarfrí
frá 1. august til og við 7. august.

Frá 8. august og til og við 15. sept.
verður avgreiðslan opin vanligu dagarnar,
tó bert fyrrapart frá kl. 10–12.



## Hús í Vági



til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 373278**



## Summarfrí

Vegna summarfrí verður kommunuskrivstovan stongd frá 7. til 21. august.

**Vestmanna Kommuna**



**MM gólv**

Monrad Mouritsen - alt innan gólvlegging

222824

Vinyl • Teppir • Linolium
Baðirúm • Vátrúm


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3054

**Navn:** P/F Vest - Trading
**Adressa:** 350 Vestmanna

**Kommuna:** Vestmanna Kommuna
**Stovningardato:** 26.05.2000
**Vi›tøkudato:** 26.05.2000
**Kapitalur:** Kr. 700.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 700.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Háldan H Haldansen, Mi›alsbrekka, 350 Vestmanna.
**Nevnd:** Jastrid McGavin, 350 Vestmanna (forma›ur), Jóhannes Haldansen, 350 Vestmanna og Háldan H. Haldansen, 350 Vestmanna.
**Stjórn:** Háldan H. Halldansen, 350 Vestmanna.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av stjóranum ella av allari nevndini í felag.
**Grannsko›ari:** Grannsko›arafelagi› Rasmussen og Weihe, Undir Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 26.05.2000 - 31.12.2001.
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og umsita partapening í ø›rum feløgum, umfram at reka handil, umbo›an og anna› starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 31. juli 2000

Kristin Balle


www.wenzel.fo
Ford


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3055

**Navn:** P/F Far - Trade
**Adressa:** 460 Nor›skála

**Kommuna:** Sunda Kommuna
**Stovningardato:** 27.07.2000
**Vi›tøkudato:** 27.07.2000
**Kapitalur:** Kr. 1.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 1.000.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Hjørleif Dahl, 460 Nor›skála.
**Nevnd:** Ann Jórun Arnadóttir (forma›ur), Andreas Joensen Dahl, 460 Nor›skáli og Hjørleif Dahl, 460 Nor›skáli.
**Stjórn:** Hjørleif Dahl, 460 Nor›skáli.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av stjóranum ella av allari nevndini í felag.
**Grannsko›ari:** Grannsko›arafelagi› Rasmussen og Weihe, Undir Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 27.07.2000 - 31.12.2001.
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og umsita partapening í ø›rum feløgum, umfram at reka handil, umbo›an og anna› starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 31. juli 2000

Kristin Balle



nøvn nú nøvn nú nøvn nú nøvn nú

## Heilsanir



*Also Erla!*
Einki vi› at strippa ø›rum, bara tí eitt mannfólk endiliga vildi taka mynd saman vi› tær.
***Heilsan sí›ukonan og myndatakarin***



*Gó›a Amy*
Hjartaliga tillukku vi› 10 ára degnum 31. juli
***Ynskja Kári og Allan***



*Gó›a fastir*
Hjartaliga tillukku vi› fø›ingardegnum 29. juli. Gó›a eydnu vi› starvinum, vit gle›a okkum at koma og vitja teg í íbú›ini.
***Bestu heilsanir Oddny og Dánjal Jákup***



*Erla!*
Hjálp vit doyggja í hita, sveittin lekur av okkum og ta› sæst aftanfyri á blusunum hjá okkum. Kunnu vit gott fáa vatn?
***Heilsan vit tystu***



*Gó›a elska›a Rebecca*
Tillukku, tillukku vi› 12 ára fø›ingardegnum 31. juli.
***Nógvar kærar heilsanir Erlomma***



*Allarbesta omma*
Eg, mamma og babba ynskja tær tillukku vi› degnum 24. juli. Takk fyri at tú altí› ert so gó› vi› meg.
***Muss, muss Malan***



Hygga síggj kroppiskinni› hjá okkum. Óskyldig? Noy ta› er hon ikki....
Hev›i mamma vita›!
***Heilsan ringt at gita***



*Allarbesta Elsa*
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku vi› 3 ára degnum 31. juli. Jesus vælsigni teg.
***Allarbesta heilsanir frá mammu og babba***



*Gó›a elska›a Amy*
Hjartaliga tillukku vi› degnum 31. juli.
***Bestu heilsanir mamma og babba***



*Erla!*
Ís, ís, ís, minnist tú hetta? Ein gó› tí›. Takk fyri ísarnar vit fingu.
***Heilsan biddararnir***



*Hvat ger hon nú!*
Hann n‡tur ta› í øllum førum.
***Heilsan vinkonurnar***


**nøvn nú** 5 ferðir um vikuna

25,- kr.

**GEVIÐ GÆTUR:**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................

**MYNDINA AFTUR:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: ..........................................................
Bústaður: ..........................................................
Bygd/býur: .............................. Tlf.: ...............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**